# ATHENA FER

**Fyrr í morgun eydnaðist at seta fólk upp á bakkan á Athenu, soleiðis at til bar at gera fast um skipið av nýggjum. Sum fyrraparturin leið, var tí minni vandi fyri, at skipið fór at gerast leyst og fór at reka fyri vág og vind á Skálafjørðinum**

Vilmund Jacobsen

Tað var um midnáttarleitið í nátt, at eldur kom í Athenu, sum liggur við oljubryggjuna hjá Runavíkar havn. Tað var skjótt, at mest sum alt skipið stóð í ljósum loga, og tað var eisini skjótt, at spreingingar vóru at hoyra umborð á skipinum.

Sum løtan leið, og einki tamarhald var á eldrinum, eins og vandi var fyri fleiri spreinginum og vandamiklum royki, ruddaði løgreglan havnalagið, har skipið liggur.

Roykurin hevur ligið av Athenu og yvir móti vesturarminum á Skálafjørðinum, og tá løgreglan í nátt heitti á fólk um at taka til rýmingar undan roykinum, hava fólk á Skála verið savnað í Bygdarhúsinum á Strondum, eins og nakað av fólki eisini hevur verið savnað í Leguhúsinum í Nesvík.

Skúlar, handlar og partvís stovnar í økinum hava verið stongd í morgun, og bussar hjá Bygdaleiðum í økinum hava ikki koyrt.

## Endar brendu

Tað stóri spurningurin í morgun hevur verið, um skipið fór at loysna frá bryggjuni, tí endar brendu av. Í fleiri tímar í morgun hevur skipið soleiðis ligið við stevninum inn móti bryggjuni, og tá hevur verið eitt sindur lættari at koma fram at framskipinum.

Fyrr í morgun eydnaðist at seta fólk upp á bakkan á Athenu, soleiðis at til bar at gera fast um skipið av nýggjum. Sum fyrraparturin leið, var tí minni vandi fyri, at skipið fór at gerast leyst og fór at reka fyri vág og vind á Skálafjørðinum.

Nú beint fyri middag var greitt, at skipið sum er fer ongan veg, tí tað hevur eydnaðist at gera fast bæði á bakkanum – og eisini hevur eydnast at sveisað festir har frammi á skipinum.

Veðrið hevur verið gott í morgun. Tað hevur mest sum verið stilli, men tað lot, sum verið hevur, hevur ført roykin yvir móti vesturarminum á Skálafjørðinum.

## Einki at gera

Tá Sosialurin í morgun hugdi, hvat DMI sigur, bendir alt á, at ættin kemur at liggja, sum hon liggur nú, nakað út í vikuna. Ikki fyrr enn hósdagin sigur hann vestliga ætt, men tá má væl roknast við, at tann nógvi eldurin og roykurin eru avhasað. Hinvegin er skjótt, at ættin kann skifta, tá lítil og eingin vindur er.




Nær Skálafjarðar Sløkkilið sær møguleikar at fara umborð á skipið, er púrasta ógreitt í løtuni.

Nógvur hiti og nógvur eldur er umborð á skipinum, og fyrrapartin visti eingin, um allar fløskurnar, sum eru umborð, eru sprongdar – ella, um fleiri eru eftir enn, sum kunnu fara í luftina. Tað er eisini komið fram, at tangi er við sløkum 20 tonsum av ammoniakki, og hetta eru veskur, sum mugu takast í størsta álvara.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Best er at fáa skipið út av Skálafjørðinum

**Hallgrím Hansen, átaksleiðari hjá løgregluni, heldur, at best hevði verið at fingið skipið sleipað út av Skálafjørðinum, soleiðis at roykurin ikki er til bága fyri fólk, fæ og ognir**

Vilmund Jacobsen

Tað er lættari at flyta skipið burtur enn at flyta fólk úr økinum. Men tað er ikki bara sum at siga tað. Tekniskt ber ivaleyst væl til at hála Athenu út av Skálafjørðinum og leggja skipið, soleiðis at roykur ella spreingingar ikki eru til bága fyri fólk, fæ og ognir.

- Jú, hetta er nakað, vit umhugsa í løtuni, men skal eitt slíkt stig takast, mugu fleiri partar, sum hava vit eitt slíkt mál at gera, vera samdir um, at hetta er tað besta.

Í samrøðu við Sosialin beint fyri middag, segði Hallgrím Hansen, átaksleiðari hjá løgregluni, at fleiri partar eru samdir um, at skilabest hevði verið at sleipað skipið út av Skálafjørðinum.

- Eg vænti ikki, at nøkur endalig avgerð verður tikin um hetta fyrrapartin í dag, men tað er ikki óhugsandi, at ein slík avgerð verður tikin, sum dagurin líður.

Hallgrím Hansen segði, at nú so nógvur roykur rekur yvir móti vesturarminum á Skálafjørðinum, er ikki óhugsandi, at hetta kann fara at føra til endurgjaldskrøv móti tryggingarfeløgunum.

- Tað eigur at verða lættari at flyta skipið burtur, enn flyta fólk úr økinum, og fæst skipið út av Skálafjørðinum, verður eisini vandin við møguligum endurgjaldskrøvum minni, sigur átaksleiðarin hjá løgregluni.

*vilmund@sosialurin.fo*



# Thor onga viðmerking

**- Vit hava ongar viðmerkingar til málið í løtuni, segði Gunbjørn Joensen, annar av reiðarunum hjá Thor, tá vit høvdu hann í telefonini fyrrapartin**

Vilmund Jacobsen

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at fáa eina viðmerking frá reiðarínum Thor, sum eigur Athenu, áðrenn blaðið fór til prentingar í dag.

Vit høvdu annan reiðaran, Gunbjørn Joensen, í telefonini, men hann helt ikki, at hann hevði hug at siga nakað um støðuna beint í løtuni.

Athena hevur annars ligið við oljubryggjuna hjá Runavíkar havn seinastu mánaðirnar, síðan eldur kom í skipið einaferð síðsta ár.

Nú var umvælingararbeiði í gongd og Articon, sum hevði høvuðsarbeiði um hendi, vóru komin væl áleiðis við umvælingini.

Tríggir mans vóru umborð á skipinum, tá eldur kom í, og teir vórðu fluttir á Landssjúkrahúsið til kanningar.

*vilmund@sosialurin.fo*